# Arabisku londini og Miðeystur

Arabiski heimurin er eitt politiskt viðbrekið øki. Bæði USA og gamla Sovjetsamveldið hava havt stóra búskaparliga og politiska ávirkan í økinum. Tað var serliga galdandi fyri Miðeystur, har *Ísrael* og grannar tess hava havt støðugar ósemjur. Men eisini nógva oljuríkidømið hjá ávísum arabiskum londum hevði áhuga hjá stórveldunum.

Eftir seinna heimsbardaga vórðu fleiri fræls arabaríki skapt, sum framhaldandi kenna ein stóran felagsskap, sjálvt um tey hava ment seg ójavnt. Stóri munurin kann verða lýstur við einum einstøkum lítlum orði: olja. Ríkastu londini í arabiska heiminum eru *Saudiarabia* og *Kuveit* á arabisku hálvoynni. Undir oyðimarkarsandinum eru eftir øllum at døma heimsins størstu ráoljujarðgoymslur. Tí hava tey londini ráð til lívskor, sum eru nógv betri enn tey, sum flestu evropeisk lond kunnu klára. Á somu hálvoyggj liggur Jemen, sum er so fátækt og syndrað, at tað er bundið at hjálp úr útlondum.

**Arabar**

Enn í dag búgva arabar á sama landøki, sum tey gjørdu fyrstu tíðini hjá stóra arabiska ríkinum. Flýgur tú yvir hesi londini, sært tú nøkur fá grøn øki við góðari jørð, har vatn er; alt hitt landið er veldigt oyðimarkarøki.

Har búgva 200 milliónir fólk. Arabiska málið og átrúnaðurin islam knýtir tey annars sínámillum ólíku ríkini saman.

## Tá ið oljulondini fingu ríka heimin at hokna

Fyrst í 1974 var knappliga trot á bensini, og í fleiri londum var bannað at koyra í bili sunnudagar. Arabisku londini vóru vorðin samd um at minka oljuframleiðsluna og margfalda prísin á olju. Fleiri vesturlendingar fóru at undrast á, um heimurin nú fór at steðga upp.





Oljan hevur skapað ríkidømi og yvirflóð í nøkrum arabiskum londum, men í londunum, har eingin olja er funnin, hevur fólkið munandi verri lívskor. Hugsa um vandan av at verða so knýttur at eini einastu útflutningsvøru!

## Palestina – eitt opið sár í Miðeystri

Ósemjan millum jødar og palestinar hevur verið í fleiri ættarlið. ST, USA og einstøk lond hava ferð eftir ferð roynt at skapa frið og semju, men stríðið er altíð kyknað upp aftur. Jødarnir, sum í hundraðtals ár hava verið spjaddir um allan heimin og forfylgdir í mongum londum, hava alla tíðina droymt um eitt egið land, *Palestina*, tað land, sum teir sambært Bíbliuni hava fingið frá Gudi.

Jødaforfylgingarnar undir nasismuni elvdu til, at jødar í hópatali fluttu til Palestina. Spenningurin vaks millum nýinnfluttu jødarnar og palestinar, sum høvdu búð har í meira enn túsund ár. Palestina hevði verið undir bretskari verju frá 1920-árunum, og tá ið bretar royndu at minka um innflytingina, svaraðu jødiskir yvirgangsbólkar aftur við morðum og álopum. Hetta gjørdi tað, at nógvir palestinar flýddu. ST skeyt upp at býta økið í eitt jødiskt og eitt palestinskt ríki. Jødarnir góðtóku uppskotið, men palestinar og tey arabisku ríkini gjørdu tað ikki.

Jødiska ríkið Ísrael varð lýst tann 14. mai 1948. Longu dagin eftir var nýggja ríkið álopið av arabisku londunum rundanum. Palestinar í hundraðtalið flýddu, allarmest til *Jordan* og *Libanon*. Tað eydnaðist ST at fáa eina vápnahvíld, og í tí sambandinum varð svenski semingsmaðurin

*Folke Bernadotte* myrdur, jødiskur yvirgangsbólkur myrdi hann. Ísrael noktaði fyri at lata palestinsku flóttafólkini koma aftur til Ísrael, men samstundis tóku teir ímóti einum stórum flóttafólkastreymi av jødum úr arabisku londunum.

Ísrael kendi seg hótt úr øllum ættum og útvegaði sær, við hjálp frá USA, eitt ógvuliga sterkt hervald. Í *seksdagakrígnum* í 1967 tók Ísrael økið vestan fyri Jordanánna – *Vestara Áarbakka* – og eystara, arabiska partin av Jerusalem frá Jordan. Í sama kríggi tóku teir Gaza og Sinaihálvoynna frá *Egyptalandi* umframt Golanheyggjarnar frá *Sýria*. Í *oktoberkrígnum* í 1973 varð vápnahvíld fingin í lag eftir stríð í ein mánað, har Ísrael hevði fingið yvirvágina. Í 1979 gjørdu Ísrael og Egyptaland av, at friður skuldi verða sínámillum, og Egyptaland fekk Sinaihálvoynna aftur.

Hersetingin hjá Ísrael hevur í øll árini verið uttan slit, men í *Oslo-avtaluni* í 1993 vórðu karmar settir um eitt avmarkað palestinskt sjálvstýri á Vestara Áarbakka og í Gaza, sí kortið. Í hesi tíðini eru alt fleiri jødar fluttir til Ísraels og hava bygt jødisk samfeløg í teimum hersettu økjunum, nevnd *búsetingar*. Spenningurin millum tey bæði fólkini hevur verið har alla tíðina, og í 2000 kyknaðu ósemjurnar upp aftur eftir sama mynstri sum áður: yvirgangsatgerðir og hevndaratgerðir. Ísrael hevur sett múrar, avbyrgingar og vaktarútbúnað upp, fyrst móti




Undir seksdagakrígnum í 1967 tók Ísrael, jordansk, sýrisk og egyptisk landøki: Eysturjerusalem, Vestara Áarbakka, Golanheyggjarnar og Gazageiran. Myrkagrøn merking vísir palestinsk landøki, sum hava sjálvstýri.

Myndin vísir gazabúgvar við toftirnar av heimi sínum í 2008.



Gaza og síðan 2002 eisini móti Vestara Áarbakka. Hesin sonevndi *trygdargeirin* verður hildin at halda yvirgangsfólki frá ísraelskum øki. Í roynd og veru hevur hetta gjørt jødisku búsetingarnar á hertiknari jørð til ein part av Ísrael og gjørt palestinska økið minni. Palestinar eru vorðnir avbyrgdir og mugu flyta seg millum hernaðarligar marknastøðir fyri t.d. at fara til arbeiðis ella á sjúkrahús.

Í desember 2008 fóru palestinar í Gaza at skjóta rakettir inn í Ísrael, sum svaraði aftur við einum stórálopi við stríðsvognum og bumbuflogførum móti Gaza býi. Nógvir bústaðir, sjúkrahús og skúlar vórðu fullkomiliga oyðiløgd. Ísrael helt, at palestinskar herdeildir krógvaðu seg har. Eftir einum mánað helt stríðið uppat. Tá vóru fleiri enn 1.300 palestinskir menn, kvinnur og børn dripin og tíggjutals ísraelskir hermenn.

Palestinska økið er fátækt og syndrað, men samráðingar fara fram fyri at fáa partarnar og rørslurnar at semjast. Fyri nógvar palestinar er tað enn ein spurningur, um teir skulu góðtaka, at ríkið Ísrael er til. Ein annar stórur spurningur er, hvør skal stjórna heilaga býnum Jerusalem.

Uttan hjálp frá USA, m.a. vápnahjálp, hevði Ísrael ikki verið til nú. Og arabisku londini hava staðið spjødd, av tí at USA og Sovjetsamveldið hava stuðlað einum arabaríki nú og øðrum tá. Í krígnum millum Ísrael og arabisku grannalondini hevur Ísrael økt sítt upprunaliga øki, sum hevur ført til uppaftur fleiri palestinsk flóttafólk kring í Miðeystri - umleið 4 milliónir fyrst í 21. øld.



Ísrael hevur bygt ein høgan múr inni á hertiknum øki á Vestara Áarbakka (sí kortið á s. 119).